# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# GEVIÐ VINNUNI EIN KJANS

Rávøran til føroysku flakavirkini er millum 80.000 og 100.000 tons, segði løgmaður í Degi og Viku í gjárkvøldið. Men kapasiteturin á flakavirkjunum er millum 200.000 og 300.000 tons. Er hetta ikki føroyska samfelagið í einum nøtuhylki?

Vit skuldu hava flakavirki á hvørjum tanga, men tað bar ikki til. Hetta sóu vit í kreppuni í nítiárunum. Flestu flakavirkini vóru løgd saman í almenna Fiskavirking, sum eftir besta førimuni skuldi royna at fáa so nógv virksemi í gongd aftur, sum til bar. Politiski myndugleikin - og samfelagið sum heild - kravdi meira av almenna býtisbarninum, enn kapitalistiski veruleikin loyvdi - og tí vórðu fleiri virki als ikki latin uppaftur. Men fimm hóraðu undan, til seinastu mønutrøini vórðu drigin seinasta fríggjadag.

Í Degi og viku í gjárkvøldið brikslaði forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag politiska myndugleikanum, at »teir« ikki gjørdu nakað sum helst fyri hesi fólkini, sum seinasta fríggjadag fingu at vita, at Fiskavirking varð farið á heysin. Hon vísti á, at tá tað galt um Smyril-Line, so var einki ófør, og har »var bara talan um nøkur fá føroysk arbeiðspláss«.

Ofta verður farið um har, ið garðurin er lægstur, men viðurskiftini hjá Smyril Line eiga at setast í eitt víðari perspektiv. Vit kunnu halda tað, vit vilja, um Smyril Line, men um stuttskygdu andstøðupolitikararnir fingu sín vilja í sambandi við Smyril Line, so sótu vit allir føroyingar við skegginum í postkassanum, tí so var als einki ferðamannaskip, sum røkti okkara uttanlandssigling.

Løgmaður var greiður í sínari talu. Hann vísti í Degi og Viku á, at hetta er ikki tíðin at peika eftir hvørjum øðrum, og at sorgarleikurin við Fiskavirking ikki neyðturviliga fær ein ringan enda. Í roynd og veru snýr tað seg bara um, at eitt stórt flakavirki og nøkur skip skulu skifta eigara - og so fáa vit eigarar, sum helst hava ráð at gjalda – *kanska øllum* – starvsfólkunum løn, tí ráðvøran er til staðar – hon hvørvur ikki við einum fíggjarligum húsagangi.



Vit mugu øll vóna, at hesin húsagangurin skjótast verður avgreiddur, og at virki og skip skjótt koma í vinnu aftur - og at um yvirkapasitetur er, at hann so verður skorin burtur.

Troyttandi er at hoyra upp á politikarar sum vilja hapsa sær politiskan vinning burtur úr einum slíkum sorgarleiki. Virðiligari er, at politiska skipanin og fakfelagsrørslan standa saman og geva kapitalinum eina hjálpandi hond – og ein kjans at endurreisa hendan so týðandi partin av okkara búskapi og tilverugrundarlag hjá so stórum parti av fólkinum.

**Sorgarleikurin við Fiskavirking fær kanska góðan enda**

# Skomager bliv ved din læst

At fleiri fjølmiðlar hava hava verið í tungum sjógvi er gingið sjón fyri søgn. At tað eisini hevur gingið tungt hjá teimum bløðum, sum hava roynt seg við ókeypis útgávum, er eisini gingið sjón fyri søgn.

Herfyri gav V-Blaðið skarvin yvir eftir eina stutta roynd við at geva út lýsingarblað í hvørt hús eina ferð um vikuna. Fyri tveimum árum síðani mátti Dimmalætting geva skarvin yvir við bæði Vikublaðnum og Vinnuvitan, sum fóru á heysin. Og tað seinasta er, at Gratisávísin, sum er komin út nakrar ferðir seinasta árið - men hevur ligið í dvala eina tíð, eisini repar seglini.



Trupuleikar at siggja hendan teldupost? Les í internet kaganum.

Gratisavísin

**Lægri prís!**

Vit lækka prísir okkara við 50% og koma á marknaðin við sterkum tilboðum til jólalýsingar. Framhaldandi fæst ókeypis grafisk uppsetan við keyp av lýsingum frá Gratisavísini. Komandi Útkomudagur er mikudagin 15. december, og freist at innlata tilfar til lýsingar er mánadagin 13. december.

Sí nýggju prísirnar til høgru.

**Taki sjálvi**

Gratisavísin kemur nú út sum 'takið sjálvi' avís og verður at fáa í flest øllum sølustøðum kring alt landið. Við hesum vilja vit tryggja okkara lýsarum, at vit bera tykkara boðskap út kring allar oyggjarnar, og at vit kunnu varðveita ein sámiligan prís. Hettar merkir, at vit

**Nýggir prísir!**

Heilsíða KR. 3.980,-
H: 360mm x B: 260mm

Hálvsíða KR.=20 1.980,-
H: 172mm x B: 260mm

Kvartsíða KR. 980,-
H: 172mm x B: 125mm

Breddi KR. 980,-
H: 60mm x B: 260mm

SERPLÁSS

Forsíða KR. 1.980,-
H: 60mm x B: 260mm

Síða 3 KR. 5.980,-

*Gratisavísin boðar frá í telduposti, at blaðið ikki longur verður borið í hvørt hús - og at lýsingarprísirnir lækka*

Útgevarin boðar um dagarnar í telduposti frá, at blaðið ikki longur verður borið í hvørt hús, men at tað verður býtt út í ávísum handlum. Tískil verður prísurin - eins og útbreiðslan - eisini sligin í botn. (Annars er tað løgin handilsskapur hjá Effo, FK, PE og INN at bjóða eina fremmanda vøru ókeypis í einum handli, meðan tilsvarandi vøra er til sølu við vinningi).

Í Degi og Viku í gjár fekk løgmaður spurningin, hví hann ikki gjørdi nakað við at avmarka kapasitetin á flakavirkismarknaðinum. Løgmaður stó sum vera man spyrjandi, tí hvat skal hann gera? Skal hann steingja okkurt flakavirki vegna yvirkapasitet?

Sjálvandi kann løgmaður ikki gera tað. Hann kann heldur ikki steingja onkrar av privatu miðlunum - ella onkran bilhandlara ella timburhandil, tí at ov nógv eru, sum bjóða seg fram - og sum harvið missa nógvar pengar.

»Veður má sær ráða«, sigur orðatakið. Sama er við marknaðinum. Vit kundu sagt, at »marknaðurin má sær ráða«. Men tað tykir ikki, sum um føroyingar hava ta vinnulívsvitilvitanina, sum skal til, fyri at fáa eina skilagóða forrætning at ganga. Alt ov nógv vilja royna seg á sama avmarkaða marknaði - og køva soleiðis hvønn annan.

Privatir íleggjarar hava mist einar 40 milliónir kónur í fjølmiðlavinnuni bara í hesari øldini!

Tápuligt, kundu vit spurt... Ja - hvat er tað annað, enn tápuligt?



**Eingin eigur at detta niðurímillum**

EYÐGUNN SAMUELSEN
KJAK Á SÍÐU 26



**Spara seks røktarpláss í Eysturoy**

TUMMAS ELI JOENSEN
KJAK Á SÍÐU 25



# Jólakonsert í Havnar kirkju

Í morgin, le kl. 17 syngja Glymur og Kristiliga Sangkórið jólaløg í Dómkirkjuni.

Hesi kórini eru vanliga rættiliga ymisk í sínum sang- og lagavali. Glymur hoyrir til tann rytmiska kórsangin, meðan Kristiliga Sangkórið vanliga syngur klassiskar sálmar og sangir. Skráin í Havnar kirkju leygardagin er rættiliga ymisk hjá báðum kórunum og er tí lagt upp til eina fjølbroytta sangløtu við kendum jólaløgum víða um í heiminum. Tónaúrvalið er frá Knúti Olsen, Händel, W. J. Kirkpatrick til Charles W. Douglass. Heri Joensen, prestur, ríkar løtuna við eini jólaheilsan. Umframt at kórini syngja hvør sína jólaskrá, syngja tey eisini saman og telja umleið hálvthundrað fólk.

Kórleiðarar eru Ingun Hentze hjá Glymi og Hanus Joensen hjá Kristiliga Sangkórinum.

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,** sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*